# Neyvan innflutningsbann



Hóast ES-eftirlitsfólkini høvdu nógvar atfinningar, skulu vit ikki vænta, at ES, eins og Russland, fer at seta innflutningsbann móti fiskavørum úr Føroyum. Hóast ES-eftirlitsfólkini, sum hava verið í Føroyum, høvdu nógvar atfinningar, so fer samveldið neyvan at seta innflutningsbann ímóti fiskavørum úr Føroyum. - ES arbeiðir heilt øðrvísi enn Russland, sigur stjórin á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Bárður Enni, við útvarpið hjá Kringvarpinum. Stjórin á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni sigur, at tað kemur fyri, at ES brúkar innflutningsforboð, men ikki, tá talan er um lond í nærumhvørvinum. Eftirlitsfólkini hjá ES hava annars longu boðað frá, at tey koma aftur um tvey ella trý ár.

# Atlantsflog ikki til Stockholm og Hetlands

Stockholm og Hetland eru ikki í ferðaætlanini hjá Atlantsflogi fyri summarið 2009. Atlantsflog boðaði í gjár keypsskálunum frá ætlanum sínum næsta summar, sum eru grundaðar á tað, flogfelagið heldur vera fíggjarliga forsvarligt. Har kemur millum annað fram, at flúgving millum Stavanger og Stockholm og London og Hetland er ikki í ferðaætlanini, tí hon kostar felagnum ov nógv. Skal hendan flúgvingin halda fram, er neyðugt at finna fígging til hennara, kunnger Atlantsflog fyri keypsskálum og partaeigarum. Annars fer Atlantsflog at flúgva til somu pláss næsta summar sum nú í summar, og Atlantsflog fer eisini næsta summar at flúgva millum Reykjavík og Narsarsuaq í Grønlandi í samstarvi við Air Iceland, sigur felagið.

# Orðblindi er tabu

**Við ráðstevnuni um orðblindi vónar Lions Club at seta hol á eitt evni, fólk ikki rættiliga vilja tosa um**

RÁSTEVNA
*Anna V. Ellingsaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

- Hóast á leið fimm prosent av øllum føroyingum eru orðblindir, er orðblindi ikki nakað, vit tosa um til dagligt. So um ein ráðstevna um orðblindi bara kann varpa ljós á trupulleikin, hava vit uttan iva gjørt nógvum føroyingum ein stóran beina.

Hetta segði Rasmus Magnussen millum annað, tá hann vegna Lions Club Tórshavn bjóðaði luttakararnum vælkomin á Ráðstevnu um orðblindi á hotel Føroyum fyrrapartin.

## Royna at yvirliva

Í røðuni brúkti Rasmus Magnussen sína egnu støðu sum dømi. Hóast hann ikki var vísur í tí, segði hann seg hava ein illgruna um, at hann er orðblindur í ávísan mun.

- Eg veit bara, at eg helst skáki mær undan at skriva og heldur royni at snakka meg burtur úr tí. Og soleiðis trúgvi eg, at tey flestu orðblindu royna at klára seg sum frægast hvør í sínum lagi. Man skal jú yvirliva í gerandisdegnum, segði Rasmus Magnussen.

Síðani hugdi hann út yvir stóru áhoyrarafjøldina og spurdi, hvussu nógv høvdu illgruna um, at tey kanska vóru orðblind.

Hóast hann lat eina fitta løtu ganga, hómaðust bert heilt fáar upprættar hendur millum teir meir enn 200 áhoyrararnar. Rasmus Magnussen fjaldi tó ikki yvir, at hann væntaði at síggja munandi fleiri gera vart við seg, tá hann fór at seta sama spurning móti endanum á ráðstevnuni.



*- Í dagsins samfelag eigur tað at vera ein sjálvsagdur rættur, at øll fáa møguleikan at læra at lesa, segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður, millum annað, tá hann setti ráðstevnuna um orblindi*

## Lykilin til lærdóm

Útgangsstøðið á ráðstevnuni var, at hóast orðblindi er ein stórur trupulleiki, er tað ein trupulleiki, sum tað ber til at gera nakað við. Tí setti ráðstevnan í stóran mun fokus á nýggjar og betri frálæruhættir innan orðblindi og tilboð um endurútbúgving til lærarar.

Hóast fólkaskúlin longu ger nógv fyri lesiveikar næmingar, ber altíð til at gera meir, vísti Jóannes Eidesgaard, løgmaður, millum annað á í setanarrøðuni. Eitt nú er alneyðugt, at ung og vaksin, sum eru orðblind og ikki hava ognað sær nóg hollan lesiførleika sum børn, fáa tilboð um undirvísing, so at eisini tey kunnu menna sín førleika, sum kann lætta um í gerandisdegnum, minti løgmaður á og legði afturat

- Fyri at tryggja, at vit koma longur fram á leið á hesum týdningarmikla øki, hevur Mentamálaráðið sett ein arbeiðsbólk at leggja eina ætlan fyri orðblindaundirvísing í Føroyum bæði við atliti at tilboðum til næmingar og eftirútbúgving fyri lærarar og serlærarar. Eisini er samstarv fingið í lag við Orðblindstovnin í Danmark og við Voksenskolen í Albertslund.

At fólk helst vilja fjala út yvir sítt orðblindi, er kanska ikki so løgi. Tí sum løgmaður vísti á, so er tað, at duga at lesa, lykilin hjá tí einstaka at kunna nema sær lærdóm, sum í flestu førum er fortreytin fyri bæði persónligari og fakligari menning í arbeiðslívi og luttøku í samfelagnum sum heild.

- At lesa er hartil ein sera týdningarmikil partur av lívsvirði okkara. Samfelagið hevur tað sum givna fortreyt, at vit øll duga at lesa. Og skulu vit fáa atgongd til lærdóm, so er lesiførleikin aftur ein fortreyt, segði løgmaður at enda, tá hann setti ráðstevnuna um orðblindi.



*- Um hendan ráðstevnan kann seta fokus á orðblindi, trúgvi eg, at vit hava gjørt sera nógvum føroyingum ein stóran beina, segði Rasmus Magnussen, ein av stigtakararnum til ráðstevnuna um orðblindi, sum Lions Club Tórshavn stóð fyri*



*- Fleiri enn 200 fólk høvdu leitað sær á ráðstevnuna um orðblindi á Hotel Føroyum í morgun*